# Óruddiligur 80ara poppur

**Heimskendi filmstjórin M. Night Shyamalan (The Sixth Sence, Signs, Lady in the Water) segði, at fyri at kunna gera ein góðan film, noyðist ein viðhvørt at taka sítt yndisbrot úr filminum, um tað kann gera heildina meira gjøgnumførda. Tað sama meti eg vera galdandi fyri tónleik. Og hendan raðfestingin manglar á annars framúrskarandi debut-fløguni hjá Heiðriki á Heygum, »An Invisible Gun«, sigur ummælarin Sunneva H. Eysturstein, ið gevur fløguni fýra av seks møguligum stjørnum**






*So gott sum alt, ið ungi havnamaðurin Heiðrikur á Heygum letur úr sínum hondum er nýtt, spennandi og stílfult. Tað veri seg málningalist, grafisk sniðgeving, myndatøka ella tónleikur*

**UMMÆLI** ★★★★☆☆

*Sunneva H. Eysturstein*
*seysturstein@gmail.com*
*Myndir: Heiðrik á Heygum, Høgni Heinesen og Erla Marita Askham*



Tað er nýtt, spennandi og stílfult. So gott sum alt, ið ungi havnamaðurin Heiðrikur á Heygum letur úr sínum hondum. Tað veri seg málningalist, grafisk sniðgeving, myndatøka ella tónleikur. Seinasta verkið, ið er komið frá honum, er nýskapandi elektroniska debut-fløgan »An Invisible Gun«, ið varð útgivin stutt fyri jól – fyrst sum stakfløga og síðani sum fløga.

Í desember mánaði kom eisini út ein onnur nýskapandi fløga. Fjósaprojektið Orca. Men í mun til Orca, var »An Invisible Gun« ikki eitt eksperimenterandi projekt, ið tilvitað skuldi gerast á ein 100 prosent ósiðbundnan hátt. Hinvegin var hon eitt úrslit av elektronisku tónleikabylgjuni, ið hevur herjað heimin seinastu árini, og loksins er farin at vísa seg aftur á tónleikamarknaðinum her heima.

## Fremstu elektro fólkini

Tað er ikki bara sum at siga tað, tá elektroniskur tónleikur skal framleiðast her á landi. Enn eru tey ikki mong, ið eiga kunnleikan til ráðs at meistra handverkið, sum liggur í at fáa elektro ljóðið at verða, sum tað skal. Men Heiðrikur hevur fingið tey røttu fólkini við í hesa prosessina.

Við í framleiðslu og programmering av løgunum er Heiðrikur sjálvur, systkinabarnið Brynjolfur á Heygum (programmeringssnillingurin, ið vit eisini kenna sum heilan handan Side Effect) og evnaríka framleiðsluduoin High-Hat, ið eru Sakaris Joensen (Lama Sea, Guðrið Hansdóttir) og plátuvendarin Janus Rasmussen, aka DJ·ÓR (Lama Sea, Bloodgroup).

Upptøkurnar eru gjørdar av Finnuri Hansen í JakZak studio og Kringvarpi Føroya, Kristoffuri Mørkøre í Krist Stuff studio, Jón McBirnie í SkýRák og av Ólavi Jákupssyni og Jens L. Thomsen í Honeyman Studios í London.

Miksing og mastring hava sviðarnir Christoffer Berg og Hans Olsson, ið eisini hava arbeitt fyri ávikavist The Knife og Robyn, staðið fyri. Sviðarnir báðir hava givið fløguni eitt rátt, beinrakið elektronisk ljóð, ið ger heildaúttrykkið frekari. Fyri mítt viðkomandi sera positivt, tá fløgan í sínari heild er rættiliga frek og vágilig.

## Rødd og rútma

Tað er eingin ivi í, at »An Invisible Gun« er ein feit fløga á altjóða støði. Heiðrikur skrivar vøkur, abstrakt løg. Tey innihalda elektronisk element og strúkara kompositiónir, ið hann sjálvur hevur skipað til meginpartin av teimum. Røddin hjá honum er altíð í fokus. Hon er í flestu løgunum skipað í fleiri ymsar variatiónir og harmoniir, er vøkur og full av kenslum. Men okkurt ger, at hon ikki er heilt tip-top. Okkurt órógvar. Tað tók mær tíð at finna útav, júst hvat tað var. Hví misti eg áhugan aftaná eina løtu? Tá eg hugsaði um eitt av løgunum á henni, ljóðaði tað væl í